# Allir limir í Føroya Arbeiðarafelag eru nú tryggjaðir

**Føroya Arbeiðarafelag fer nú at senda øllum lokalfeløgunum ein faldara, har tað verður greitt frá teirri nýggju tænastuni, sum felagið nú veitir limunum**

TRYGGING
*Áki Bertholdsen*



*Allir limir í Føroya Arbeiðarafelag eru nú tryggjaði. Í einum lítlum, snøggum faldara, fáa limir Føroya Arbeiðarafelag nú alt at vita um tað nýggju tryggingina. Faldarin verður sendur lokalfeløgunum, sum síðani býta hann út til limirnar*

Í fjør fór Føroya Arbeiðara undir eitt nýtt tiltak, sum fer at fáa stóran sosialan týdning fyri allar limirnar í felagnum. Tá gjørdi felagið avtalu við danska tryggingarfelagið Alka um at tryggja allar limirnar í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað vil sostatt siga, at nú eru øll, sum eru limir í einum av lokalfeløgunum undir Føroya Arbeiðarafelag, tryggjað. Tryggingin verður útgoldin, um ein doyr, ella um ávísar álvarsligar sjúkur tekur seg upp.

Fyri at kunna limirnar um tryggingina, fer Føroya Arbeiðarafelag nú at senda øllum lokalfeløgunum ein faldara, har tað stutt og greitt verður greitt frá, hvussu ein ber seg at fyri at fáa trygging útgoldna, um so illa vil til, at tað verður neyðugt.

Tryggingin er galdandi líka til ein fyllir 67 ár. Tvs, at tá ið ein fyllir 67 ár, og røkkur eftirlønaraldri, fellur tryggingin burtur.

Men um ein doyr 66 ára gamal, ella yngri, verða 155.100 krónur útgoldnar í trygging. Somuleiðis verða 51.700 krónur útgoldnar, um ávísar álvarsligar sjúkur, taka seg upp hjá einum, sum er 66 ár, ella yngri.

Vert er at leggja til merkis, at tryggingin er skattafrí.

Hetta er ein trygging sum allir limir í Føroya Arbeiðarafelag undir 67 ár, og sum arbeiða, ella fáa arbeiðsloysistuðul, koma í av sær sjálvum.

Men aðrir limir kunnu eisini koma við í tryggingina. Teir skulu venda sær til Føroya Arbeiðarafelag og søkja um at koma uppí tryggingina.

Tryggingarupphædddin verður goldin næsta avvarðandi. Men upphæddin verður goldin uttan um búgvið, so at tey, sum møguliga hava krøv ímóti tí, sum doyr, kunnu ikki krevja at fáa burturav tryggingini.

Men tann, sum er tryggjaður, kann eisini gera av, at tryggingin skal gjaldast til onnur, enn næsta avvarðandi. Eitt nú er tað ikki óvanligt, at pør liva saman, uttan at vera gift. Og tá ið onki vígslubræv er kann tað elva til trupulleikar.

Vil tann, sum er tryggjaður, at onnur, enn næstu avvarðandi, skulu hava tryggingina útgoldnað, ber til at fáa eitt skjal frá Føroya Arbeiðarafelag, har tað skal skrivast á, hvør skal hava tryggingina.

Hetta skjalið kann broytast, men so skal ein aftur venda sær til Føroya Arbeiðarafelag og fáa eitt nýtt skjal, sum so verður fylt út.

Men eisini í hesum sambandi eru heilt serligar reglur galdandi, sum tað er klókt av tryggingartakaranum at seta seg væl inn í, tí annars kann hann skjótt vera um ein háls.

Tríggjar vikur áðrenn frumsýningina:

# Leikstjórin er givin

**Hollendski leikstjórin hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag segði í farnu viku starv sítt upp og fór av landinum. Hon helt ikki, at samstarvið riggaði**

SJÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tríggjar vikur áðrenn ætlaðu frumsýningina av nýggjum leiki stendur Klaksvíkar Sjónleikarfelag uttan leikstjóra.

Caroline Zantonique gavst í farnu viku sum leikstjóri, og leygardagin fór hon aftur til Hollands.

– Tað var ógjørligt hjá mær at halda fram sum leikstjóri. Tað er eingin ávísur persónur ella hending, sum hevur gjørt, at eg eri givin, men heldur nógvir smálutir, sum at enda gjørdu tað ógjørligt at halda fram, sigur Caroline Zantonique.

Hon kom í januar mánaði til Klaksvíkar at leikstjórna klassiska leikin, Aftugongur, sum Henrik Ibsen skrivaði í 1881.



*– Eg kom ikki til Klaksvíkar fyri at gevast, so tí eri eg sjálvandi vónbrotin av hesum, sigur Caroline Zantonique, sum nú er farin av landinum.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

### Fingist nógv við sjónleik

Caroline Zantonique var í Føroyum sum ferðafólk í fjør, og tá var tað, at hon fekk samband við Klaksvíkar Sjónleikarfelag.

Síðani samskifti hon nakað við felagið, og endin var, at hon kom til Klaksvíkar at leikstjórna.

Hollendski leikstjórin hevur fingist við sjónleik, síðani hon var seks ára gomul. Hon hevur spælt, men seinnu árini hevur hon serliga virkað sum leikstjóri heima í Hollandi.

Hon er ættað úr Utrecht, og tað er higar, hon nú er farin.

### Vónbrotin

Seinastu vikurnar hava teir fimm leikararnir og leikstjórin vant nýggja leikin, sum eftir ætlan skuldi hava frumsýning 10. mars.

– Eg kom ikki til Klaksvíkar fyri at gevast, so tí eri eg sjálvandi vónbrotin av hesum. Eg ivist heldur ikki í, at leikararnir eru vónbrotnir og keddir av, at eg eri givin, sigur Caroline Zantonique.

– Tá eg upplivdi ein múr millum meg og leikararnar, visti eg ikki, hvussu eg skuldi fram, og tí helt eg tað vera best, at eg gavst.

Hollendski leikstjórin sigur seg ongantíð áður verða givin sum leikstjóri, áðrenn arbeiðið var liðugt.

### Eingin avgerð

Venjingarnar við nýggja leikinum eru komnar væl ávegis, men framvegis er fitt av arbeiðið eftir, áðrenn leikurin kann frumsýnast.

Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur ikki enn tikið endaliga avgerð um, hvussu tað verður við leikinum.

Mest sannlíkt er tó, at nýggjur leikstjóri fer at standa fyri leikinum, sum helst verður frumsýndur nakrar vikur seinni enn ætlað.

## Klóraður í andlitið

Um vikuskiftið brustu tveir mans saman í einum dansistaði í Havn.

Annar av monnunum varð klóraður illa í andlitið og hálsin, og løgreglan varð boðsend at leggja uppí.

Maðurin, sum gjørdi seg inn á hin, varð tikin av løgregluni. Hann hevur viðgingið seg sekan og sigur seg verða keddur av hendingini.

Maðurin verður ákærdur fyri harðskap.

**ek**

## Bilar fingu skaða

Um vikuskiftið gjørdi onkur seg inn á fleiri bilar í Varðagøtu í Havn. Bilarnir høvdu fingið snuddir í síðuna, og onkur spegl vóru brotin.

Løgreglan í Havn veit ikki, hvør hevur gjørt herkini.

Ein bilur, sum stóð í Gundadali, fekk eisini skaða. Her hevði onkur brotið forrútin á bilinum.

**ek**

## Eldur í hjá Reyni Service

Fríggjakvøldið var sløkkiliðið í Havn boðsent til ein eldsbruna hjá bilfyritøkuni Reyni Service.

Talan var um ein eld í eini luftskipan í sproytukabinuni, men talan var ikki um nakran størri eld.

Eldurin varð sløktur, áðrenn hann slapp at breiða seg ella gjørdi størri skaða.

**ek**



# Fullveldið í leysum lofti

**Fólkaatkvøðan um ein sjálvstýrisleist fram at fullveldinum hevur skapt grundleggjandi ósemju millum samgonguflokkarnar. Fólkaflokkurin vil onga fólkaatkvøðu hava. Tjóðveldisflokkurin heldur fast um fólkaatkvøðuna. Sjálvstýrisflokkurin vil hava fólkaatkvøðuna útsetta. Veljarin stendur eftir við ongum úrslitum og órgreiðum meldingum eftir samgongufundin fríggjadagin. Vit prenta her logbók frá tíðindamonnunum hjá Sosialinum, sum vóru í Tinganesi meðan samgongufundur var**

## Økt er tal av kappagrøvum



**Tjóðveldismenn vóru ikki bjartskygdir áðrenn samgongufundin fríggjadagin. Heini O. Heinesen kvað um kappargravir á Stiklastøðum**

SAMGONGUKREPPA
*Edvard Joensen*

Fríggjadag kl. 14.15:
Eftir at komið var út, at løgmaður ikki hevði hug at hava nakra fólkaatkvøðu um fullveldisætlanina, varð samgongufundur hildin i Tinganesi.

Ikki tóktust allir samgongulimir hava tær stóru vónirnar til, at nakað gott fór at spyrjast burtur úr.

Serliga tjóðveldismenninir hildu ikki, at nakað var at heinta. Heini O. Heinesen kom kvøðandi upp gjøgnum trappurnar: »Lokið stríð á Stiklastøðum, økt er tal av kappagrøvum,« uttan tó at leggja nakað meria nágreiniligt í, hvørjir falnui kapparnir vóru. Men sum skiltist metti hann, at tjóðveldismenn fóru at falla í hesum stríði.

Eingin hevði tó hug at gera nakrar viðmerkingar til tað, sum viðgerast skuldi.

Báðir ungu landsstýrismenn Fólkafloksins sótu í eini sofu úti á loftinum og skemtaðust, meðan hinir fólksfloksmenninir og sjálvstýrisfólkini sótu í fundarhølinum og bíðaðu eftir tjóðveldisfólkunum, sum vóru nakað seinkað.

Líkt var tó ikki til, hóast alt, at allir tjóðveldismenninir vóru so øgiliga keddir av støðuni. Mentamálaráðharrin hevði hug og stundir at seta seg hjá pressufólkunum uttan fyri eina løtu at tosa um leyst og fast.

## Rennisjógvur í Tinganesi

**Samgongufólk fóru av fundi klokkan knapt hálvum fimm fríggjadagin. Einki varð avgjørt uttan tað, at partarnir eru samdir um onga semju at hava, segði løgmaður**

SAMGONGUKREPPA
*Edvard Joensen*

Einki spurdist burtur úr samgongufundinum í Tinganesi fríggjadagin. Trý uppskot liggja á borðinum, men eingin avgerð er tikin.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, sigur, at fundurin er fyribils niðurlagdur og verður ikki tikin uppaftur, fyrr enn løgmaður er komin aftur av uttanlandsferð einaferð í aðru viku.

Løgmaður fer til Bretlands um vikuskiftið og verður ikki aftur fyrr enn í fyrsta lagi um eina góða viku, og fyrr enn tá hendir ikki meira í málinum, sigur hann.

Hann leggur tó dent á, at samgongan er líka heil, sum hon var, áðrenn fundin fríggjadagin. Og tað verður einki uppskot lagt fyri tingið, meðan løgmaður er burturstaddur.

Løgmaður heldur tað ikki vera nakran trupulleika, at hann fer uttanlands í meira enn eina viku, hóast líkt er til, at stjórnarkreppa er í landinum.

## Løgmaður bíðar

**Løgmaður bíðar, meðan Tjóðveldisflokkurin hevur »time out«**

SAMGONGUKREPPA
*Edvard Joensen*

Fríggjadag kl. 15.00:
Anfinn Kallsberg, løgmaður gongur hvítklæddur og skemtast við tíðindafólkið í Tinganesi.

Hann heldur ikki, at nakað er hjá pressuni at sita og bíða eftir. Fyribils hevur Tjóðveldisflokkurin biðið um »time out«, og er farin í einrúm at viðgera støðuna, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Hann tekur annars uppaftur, at hetta er ein heilt vanligur samgongufundur, sum nú verður hildin.

Men løgmaður heldur uppá, at tað er ikki rætt at fara í Tingið við einum uppskoti um fólkaatkvøðu, tí hann vil ikki útseta seg fyri tí møguleikanum, at samgongan tapir eina fólkaatkvøðu.

Anfinn Kallsberg sigur, at trupulleikin í málinum er, at tann fólkaatkvøðan, sum landsstýrið hevur sett til at verða ár 2012, verður av danska forsætisráðharranum fortolkað til at vera tann, sum ætlað var at hava nú.

Við øðrum orðum ásannar løgmaður, at hann gongur undir treytirnar, danska stjórnin setur í fullveldismálinum.

Meðan løgmaður tosaði við tíðindafólkini komu tjóðveldisfólkini aftur. Høgni Hoydal hevði bert ta viðmerking, at teir stóðu enn í sama stað, sum teir altíð hava verið.

Onkur annar tjóðveldismaður segði so hissini inn eftir gólvinum, at teir bert vóru samdir um at vera ósamdir. Fyribils eru framvegis trý uppskot á borðinum. Eitt frá hvørjum flokki í samgonguni, sum tey vóru, tá fundurin byrjaði fyri góðum tveimum tímum síðan.

## Løgmaður hevur brotið avtalu

**Tjóðveldisflokkurin staðfesti á fundi í dag, at løgmaður hevur brotið samgonguavtaluna um fólkaatkvøðu, sum hann alment boðaði frá á tíðindafundi 1. februar**

SAMGONGUKREPPA
*John Johannessen*

Leygardagur 19.19:
Løgmaður hevur brotið avtaluna, sum hann boðaði Føroya fólki frá fyri opnum sjónvarpsskíggja 1. februar.

Hetta staðfestir Heni O. Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins, eftir drúgvan fund í Tjóðveldisflokkinum í dag. Tjóðveldisflokkurin hevur viðgjørt støðuna, sum tók seg upp, tá løgmaður í gjár boðaði frá, at hann ikki tekur undir við áður fráboðaðu fólkaatkvøðuni um 26. mai.

– Vit halda fast um, at fólkaatkvøðan skal vera, og vit halda, at løgmaður og Fólkaflokkurin skylda okkum eina góða frágreiðing, sigur Heini O. Heinesen.

Tjóðveldisflokkurin hevur enn ikki tikið støðu til, um avgerðin hjá løgmanni skal fáa avleiðingar fyri samgonguna.

– Hetta er nakað, sum vit koma at viðgera næstu dagarnar, sigur Heini O. Heinesen.

Helena Dam á Neystabø, forkvinna Sjálvstýrisfloksins, átalaði í Útvarpi Føroya í kvøld, at løgmaður fer til Bretlands á almenna vitjan beint eftir, at hann hevur skapt eina samgongukreppu í Føroyum.

Heini O. Heinesen er samdur við Helenu Dam á Neystabø.

– Tað ber ikki til, at løgmaður meldar soleiðis út og síðani fer av landinum í eina viku, sigur Heini O. Heinesen.